## Starvsfólk
til Postverk Føroya

Søkt verður eftir skrivstovufólki til p/f Postverk Føroya at byrja skjótast tilber.

Starvið er avloysarastarv fyri fólk í farloyvi, og er í fyrsta umfari fyri ½ ár. Møguliga kann haldast fram í starvinum. Talan er um fulltíðarstarv.

Arbeiðsøkið verður í høvuðsheitum avgreiðsla av viðskiftafólki, men annað arbeiði kann eisini koma fyri. Arbeiðsplássið verður Meginposthúsið í Tórshavn, men viðkomandi skal kunna starvast á øðrum posthúsum eisini.

Førleikar: Ynskiligt er at tann sum settur verður, hevur skrivstovuútbúgving ella aðra hóskandi handilsliga útbúgving. FHS er ein treyt.

Einginleikar: Tú skalt duga væl at samstarva, vera kundavinarlig/-ur og dáma avbjóðingar.

Løn: Løn eftir sáttmálanum millum Føroya Landsstýri og Føroya Postfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Finngerð S. Hansdóttur tel. 346018 ella 212193.

Skrivlig umsókn verður í seinasta lagi 14. februar 2006 at senda til

Postverk Føroya
Postboks 3009
110 Tórshavn

Postverk Føroya

## Frá S & K felagnum

Aðalfundur felagsins verður í Havn á Hotel Tórshavn leygardagin 18. februar 2006 kl. 19.30. Dagsskrá sambært lógum felagsins.

1) Frásøgn formansins frá farna ári
2) Roknskapur til góðkenningar
3) Val av nevndarlimum og tveimum tiltakslimum
4) Val av formanni
5) Innkomin uppskot
6) Ymiskt
7) Lógarbroytingar. Uppskot er frá nevndini.

**S & K felagið**

## Vøruhúsið í Runavík
Soknast eftir vaskifólki at byrja skjótast tilber

Arbeiðið umfatar reingerð av handlinum og møbladeildini

Arbeiðstíðin er í miðal 26 tímar um mánaðin

*Umsóknin skal sendast til*
**Heiðavegur**
**600 Saltangará**

Meiri fæst at vita við at venda sær til Hjørdis Jørgensen á telefon 216185 ella á 448280

**Vøruhúsið í Runavík**

## Vælkomin til missiónsviku
í Gøtu í døgunum
7-12. februar 2006

**Møtini verða í kirkjukjallaranum.**

*Skrá fyri møtunum*

**Týskvøldið 7. februar**
kl. 20.00 Martin Restorf Jacobsen talar
Bethaniakóri syngur

**Mikukvøldið 8. februar**
kl. 20.00 Regin Høgnesen talar
Essa Jacobsen syngur

**Hóskvøldið 9. februar**
kl. 20.00 Jóhan Hendriksen talar
Streingjakóri í KFUM og K úr Klaksvík syngur
Innsavnan til Heimamissiónina

**Fríggjakvøldið 10. februar**
*kl. 20.00 Margeir Toftegaard talar*
*Thaborkóri syngur*

**Leygarkvøldið 11. februar**
*kl. 20.00 Tey ungu skipað fyri*
*Pól Johannesen talar*
*Ungdómskóri á Glyvrum syngur*
*Innsavnan til nýtt missónshús*

**Sunnudagin 12. februar**
Kl. 12.00 Gudstænasta v/ altargongd
Martin Restorf Jacobsen.
Kl. 14.00 Sunnudagsskúli.
Kl. 18.00 Niels Jacob Nielsen, talar
Bethaniakóri syngur.

***Skipað verður fyri barnaansing fríggjakvøldið, leygarkvøldið og sunnukvøldið***

## Musikkskúla-skipanin

**Gittarlærari**
søkist at byrja beinanvegin og fram til 31. mai 2006.
Undirvíst verður 4 klokkutímar um vikuna í Klaksvíkar Tónlistarskúla.

**Træblásari**
Avloysari søkist fyri lærara í farloyvi frá 13. februar til 7. apríl 2006.
Undirvíst verður tilsamans 9 klokkutímar um vikuna í blokkfloytu, klarinett og saxofon á Oyrarbakka og í Hósvík.

Lokið prógv frá musikkonservatorium krevst. Onnur kunnu tó søkja.
Setanar- og lønarviðurskifti sambært sáttmála millum Musikklærarafelagið og Fíggjarmálaráðið.
Meira fæst at vita hjá leiðaranum Martin Mouritsen á tlf. 216462.

**Musikkskúlaskipanin**
Hoyvíksvegur 72
FO-100 Tórshavn · Tlf. 316462
Teldupostur: martin@mmr.fo
www.musikkskulin.fo

## Søkt verður eftir
**fólki til alibrúk okkara á Fuglafirði**

Ísambandi við nýggja útseting av sílum á Fuglafirði, verður við hesum søkt eftir tveimum røskum fólkum. Einum alara og einum alaralærlingi.

**Alari**
Til starvið sum alari er tað ein fyrimunir, um tú hevur royndir at arbeiða við aling, men er hetta tó ikki nøkur treyt. Hevur tú eginleikar sum nærlagni, røkiskap, evni til at samskifta og í felagsskapi at røkka settum málum, so er tað tær vit møguliga leita eftir. Væntað verður at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt, dugir at nýta bát og hevur ein ávísan førleika í at arbeiða við togverki. Arbeiðið er vanlig arbeiðstíð, umframt at tú kemur at verða í eini vaktarskipan. Løn sambært avtalu.

**Alaralærningur**
Hevur tú áhuga í at útbúgva teg sum alara, so er ein spennandi møguleiki her. Væntað verður, at tú ert sjálvstøðugur, arbeiðssamur, røkin og hevur stóran áhuga í at arbeiða við livandi fiski. Læran er skipað við praktiskum arbeiði og við skúlagongd á fiskivinnuskúlanum í Vestmanna. Høvuðsarbeiðið er røkt av fiski, men tú kemur eisini at arbeiða við togverki og neti, umframt øllum tí tekniska útbúnaðinum, ið er á alistøðini. Løn sambært sáttmála.

Um hetta er nakað fyri teg, so send eina skrivliga umsókn saman við prógvum og møguligum viðmælum skjótast gjørligt til:

**Vestlax**
Postboks 82, 410 Kollafjørð,
Fax 477002, Tlf. 477000 ella
e-mail: leif@vestlax.fo

Umsóknarfreist: 8. februar 2006

**Mentamálaráðið**
*Vinnu- og miðnáms-skúladeildin*

## Sjálvlesandi
### Innskriving til próvtøku í ymsum miðnámsútbúgvingum

Sjálvlesandi, her í millum umgangarar, ið á sumri 2006 ætla sær til FHS-, SIF-, HH-, HT- ella HIF-próvtøku, skulu í seinasta lagi 25. februar 2006 innskriva seg til próvtøku við tann skúlan, har tey ætla sær til próvtøku. Innskrivingarblað at fylla út fæst frá skúlanum.

Tórshavn, 1. februar 2006
**Mentamálaráðið**